GSM telefonir
Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic
Tráðleysar
Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast
Til skip og bátar
NMT 450 - VHF telefonir v.m.
Storno SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi
Beinleiðis frá framleiðara
Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan spf
Læarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311820

Jørn Nielsen úr Danmark talar á hesum fundum kring landið um evnið »Ísrael og viðurskiftini í Miðeystri í dag«

Sunnudagin 31. oktober kl. 14.30:
Fyrilestur í Høllini á Hafnia
Týskvøldið 2. november kl. 19.30:
Almennur fundur í kafeteria í Ítróttarhøllini á Kambsdali
Mikukvøldið 3. november kl. 20.00:
Fundur í Betesda, Klaksvík
Hósvkvøldið 4. november kl. 20.00:
Ísraelsfundur í Fildelfia, Gøtu
Leygardagin 6. november kl. 16.00:
Almennur ísraelsfundur í Ósáskúlanum í Klaksvík
Sunnudagin 7. november kl. 14.30:
Almennur ísraelsfundur á Hotel Øravík
Mánakvøldið 8. november kl. 19.30:
Almennur ísraelsfundur í Samljóð í Skopun

Ísraelsfelagið

Minningarhald í Søldarfirði

Minningarhald teirra sjólætnu verður
við minnisvarðan í Søldarfirði
Allahalgannadag kl. 14.00.
Meinhard Bjartalíð, prestur talar.
Aftaná verður drekka at fáa í bønhúsinum
í Søldarfirði.

Runavíkar býráð

Kunngerð

Til veljarar til kommunuvalið tann 9. november 2004 í Sumbiar kommunu.

Atkvøðugreiðslan fer fram týsdagin 9. november 2004 á hesum støðum:

Fyri veljarar í Sumba og Víkarbyrgi:
á kommunuskrivstovuni í Sumba

Fyri veljarar í Lopra og Økrum:
í skúlanum á Leiti

Atkvøðugreiðslan fer fram millum kl 10.00 og kl. 20.00 og heldur fram, so leingi veljarar møta uttan steðg.

Veljarar, ið sambært vallógina hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøðu á kommunuskrivstovuni til og við mánadagin 8. november 2004.

Tey, ið vegna sjúku ella væntandi førleika ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima til og við dagin fyri valið. Hesi kunnu boðað kommunuskrivstovuni frá hesum á tlf.nr. 370344, 373506 ella 370006 í seinasta lagi mánadagin 8. november kl. 15.00.

Gjørt verður kunnugt, at valkort verða send øllum veljarum, ið standa á vallistanum. Veljari, sum ikki fær valkort, ella fær valkort við villum í, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna sum skjótast.

28. oktober 2004

v/Valnevndina í Sumbiar kommunu
Amy Bech

FØROYA ARBEIÐARAFELAG

ÁMINNING til limir felagsins

Vit skulu enn einaferð minna limir okkara á, at limur sum gerst arbeiðsleysur ella sjúkur, kann halda áfram í Felagslívstryggingarskipanini til 67 ára aldur, við at gjalda eitt ávíst mánaðargjald til FA – gjaldingin **skal** byrja áðrenn 3 mánaðar frá tí, at limurin er givin at arbeiða.

Limir fáa nærri upplýsingar við at venda sær til FA á tlf. nr. 312101.

Kunngerð

Gjørt verður kunnugt, at ferðslan í Kvívík er broytt soleiðis, at:

Áarvegurin er einsrættaður oman móti Toftunum.

Vegurin niðan frá Toftunum (móti Fútastræti), er einsrættaður niðan til Víkarvegin.

Kvívíkar Kommuna

Leiðari til dagstovnin í Hósvík

Hósvíkar kommuna byggir ein nýggjan dagstovn í Hósvík, har pláss verður fyri 58 børnum í aldrinum 0-10 ár. Í hesum sambandi verður søkt eftir leiðara.

Høvuðsuppgávur:
- At hava leiðsluna og ábyrgdina av stovninum
- At samskipa arbeiðið á stovninum
- At skapa trivnað á stovninum

Vit sóknast eftir persóni, ið:
- Kann ganga á odda og dugir væl at fyrisita/leiða
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og myndugleikar
- Er opin fyri nýhugsan

Útbúgving/royndir:
- Námsfrøðiliga útbúgving.

Royndir innan leiðslu og umsiting kunnu vera ein fyrimunur.

Lønar- og setanarviðurskifti:
Eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelag.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

Meir fæst at vita við at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 422366.

Umsóknir saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Hósvíkar kommunu, Rættarvegur 10, 420 Hósvík, í hendi **í seinasta lagi 8. november 2004.**

Hósvíkar kommuna

Hjálpargrunnurin

fyri óarbeiðsførar fiskimenn

Umsóknarbløð til grunnin fáast við at skriva til: **Postboks 2114, FO-165 Argir**, ella at ringja á tlf. 31 60 89 (svarar eftir arbeiðstíð) ella leggja boð á telefonsvararan.

Umsóknir til hjálpargrunnin mugu vera grunninum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 10. desember 2004.

Hjálpargrunnurin

Hósvíkar kvøldskúli veturin 2004/2005

Undirvíst verður í Handarbeiði/ítriti í vetur.

Luttøkugjald: 300 kr.

Tilmelding hjá læraranum:
Emly Olsen,tlf. 422348/722348.

Undirvísingin er treytað av, at nóg nógv tekna seg.

Hósvíkar kvøldskúli

ítróttur
Nr. 208 • leygardagur • 30. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Sponsor-nøvn sleppa ikki framat

Sjónvarpið og Útvarpið vilja ikki, at teirra sendingar skulu setast í samband við sponsorar hjá triðja parti

SPONSOR-AVTALUR
Jákup Mørk

Herfyri kunngjørdi Hondbóltssambandið á tíðindafundi, at teir høvdu gjørt avtalu við Atlantic Airways og Sunset Boulevard, sum framyvir skuldu stuðla bestu mans- og kvinnudeildini í landinum.

Millum annað innibar avtalan, at hondbóltskappingarnar framvyir skulu broyta navn, soleiðis at talan nú verður um ávíkavist Atlantic Airways-kappingina og Sunset-kappingina. Slíkar avtalur hava verið vanligar uttanlands í fleiri ár, og eitt er at ivast í, at Hondbóltssambandið við hesum hevur roknað við einum møguleika at økja um inntøkugrundarlagið.

– Uttanlands sært tú jú nøvn sum Sas-ligan og Landsbankadeildin, so eg skilji ikki, hví tað ikki skal góðtakast her, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantic Airways

– Hjá okkum er talan um eitt prinsipp-mál, har vit ikki vilja lata okkum diktera av fólki uttanífrá, hvat verður sagt ella kemur á skíggjan í Sjónvarpinum, sigur Øssur Winthereig

Skilir ikki orsøkina

Men tað er nú nógv, sum bendir á, at hetta lýsingaravtalurnar ikki verða so áhugaverdar, sumk HSF hevði ætlað.

Í øllum førum tykjast hvørki Út- ella Sjónvarpið at hava tikið nýggju nøvnini til sín.

Og tað er einki at ivast í, at hetta ikki gevur sponsorunum tað, sum tey høvdu ætlað at fáa burturúr avtaluni.

– Um so er, at miðlar ikki vilja brúka nøvnini á deildunum, so fáa vit í øllum førum ikki tað burturúr eini slíkari avtalu, sum vit høvdu roknað við. Nú eri eg sum so ikki kunnugur við nágreiniliga innihaldið í sjálvari avtaluni, men tú kanst tú jú spyrja teg sjálvan, hvat ein slík avtala er verd, tá støðan er soleiðis, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflog.

– Og eitt er, hvat hon er verd fyri okkum, men eg rokni við, at smeiturin er ikki minni hjá Hondbóltssambandinum, sum soleiðis verður blokerað í einum lýsingarmøguleika. Uttanlands sært tú jú nøvn sum Sasligan og Landsbankadeildin, so eg skilji ikki, hví tað ikki skal góðtakast her.

– Sjálvur haldi eg, at tað kundi verið áhugavert at vita, hvør grundgevingin er fyri eini slíkari støðu. Tað er einki at ivast í, at fjølmiðlar, ítróttur og sponsorar øll hava brúk fyri hvørjum øðrum. Og miðlarnir vilja jú fegnir vera við, tá onkur stuðlar teirra sendingum. Einaferð var tað jú soleiðis, at eingin vildi hoyra talan um lýsingar í elektronisku miðlunum, men tann støðan er í øllum førum broytt í dag, heldur Magni Arge.

Vilja ikki dikterast

Og tað tykist í øllum førum, sum hava loftbornu miðlarnir eina púrasta greiða støðu til, hví nøvnini á deildunum ikki verða lýst soleiðis, sum HSF og sponsorarnir vilja hava tað.

Í Sjónvarpinum er støðan í øllum førum púrasta greið. Øssur Winthereig, sum er tíðindaleiðari í SvF, sigur, at fyri teirra viðkomandi er talan um ein prinsipiellan spurning. Og at Sjónvarpið í øllum førum í fyrstu atlogu hevur tikið eina greiða støðu.

– Tað er rætt, at vit ikki vilja brúka hasi nøvnini. Hjá okkum er talan um eitt prinsipp-mál, har vit ikki vilja lata okkum diktera av fólki uttanífrá, hvat verður sagt ella kemur á skíggjan í Sjónvarpinum. Og vit vilja so ikki verða koblað upp á eina sponsoravtalu, sum onkur annar hevur gjørt við eina fyritøku, sum vit einki hava at gera við.

Spurdur, hvørt tað er rætt at hava slíka støðu, tá liknandi avtalur eru at síggja í londunum kring okkum, sigur Øssur, at tað kunnu tey ikki taka atlit til.

– Tað er fullkomuliga líkamikið, hvussu tey gera aðrastaðni. Spurningurin er í mínari verð ógvuliga prinsippiellur, tí hvat verður so tað næsta, sum fólk skulu diktera okkum, fyri at tey kunnu forvinna pengar. Sponsorpengar, sum í prinsippinum eins væl kundu enda í kassanum hjá Sjónvarpinum?

– Nú skal eg ikki leggja nakran undir nakað sum helst. Men eg rokni við, at handan avtalan millum annað er tengd at, at navnið á stuðlinum skal síggjast á skíggjanum hjá okkum, men tað verður so av ongum. Vit fara ikki at skriva produkt-nøvn á skíggjan, bara tí onnur vilja hava tað, staðfestir Øssur Winthereig.

Samstundis vil tíðindaleiðarin tó eisini viðganga, at miðlar og ítróttur hava tørv á hvørjum øðrum.

– Sjálvandi er sjónvarpið og lýsingar ein partur av spælinum. Vit gera jú eisini samrøður, fyri tað um ein leikari er í einum búna, har stuðlarnir síggjast, ella um ein lýsingarveggur verður settur aftanfyri. Enntá um hesin oyðileggur myndina. Munurin tá er bara tann, at tá er hetta sum bakgrund til tað, sum vit vilja vísa. Markið hjá okkum er, tá hetta brádliga skal verða forgrundin, staðfestir Øssur Winthereig at enda.

Søljan aftur til prótvtøku

Positiva elementið higartil í kappingini, Søljan, hevur truplast hugsandi uppgávuna, tá tær á útivølli hitta meistaraliðið

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Sum vant verða fýra dystir leiktir í bestu kvinnudeildini um vikuskiftið, og serliga í Klaksvík tykist talan verða um áhugaverda uppgerð.

Søljan hevur higartil verið positva innslagið í landskappingini, og tó at tær seinasta vikuskiftið máttu lúta fyri VB, so góvu tær greið tekin um, at tær ætla sær at vera við frammi í oddinum hetta kappingarárið.

Ta ferðina skrivaðu vit, at talan var um prótvtøku, og hendan er ikki minni leygardagin, tá tær vitja hjá Stjørnuni.

Stjørnan hevur ikki tapt landskappingardyst síðani tær í mars mánaði taptu heimadystin móti VB, og tær miðja helst eftir sigri aftur hesaferð. Avrikið móti Neistanum seinast staðfesti tó, at meistararnir kunnu vera til at tosa við. Ikki minst hevur tað týdning, um Joan M. Djordjevic kemur heim til dystin.

Og skal Søljan fylgja við heilt frammi, so er ein sigur sera umráðandi. Gaman í er talan enn bert um grundspælið, har stiginí at kalla bert telja hálvt, men sálarliga hevur tað helst stóran týdning, at munurin ikki gerst ov stórur ov tíðliga.

Hin dysturin leygardagin verður millum Neistan og Tjaldur, og eftir úrslitunum higartil at døma, so verður talan her um tryggan heimasigur.

Sunnudagin eru so aftur tveir dystir á skránni. Í Havn fara Kyndil og VÍF at dystast um, hvør teirra skal sleppa sær longur úr botninum. Bæði fingu tey sini fyrstu stig í triðja umfarinum, og so verður spennandi at síggja, hvørt tað verða Ioana Rápa og VÍF ella Lotte Sørensen og Kyndil, sum fara avstað við stigunum.

Seinasti dysturin er á Skála, har VB vitjar StlÍF. Eftir tepra tapið fyri Stjørnuni í fyrsta umfarinum hevur VB víst, at tær ætla sær at fylgja við í oddinum, og so er kravið heilt einfalt ein sigur á Skála.